LM-140/2020

Annika Petersen

Fra: Birita Biskopstø <birita@industry.fo>
Sendt: 6. april 2021 15:01
Til: VMR-Journal
Cc: Sørin Pram Sørensen; Belinda Kjærbo
Emne: Hoyringssvar frá Ferðavinnufelagnum
Vedhæftede filer: umhvxr-ferxa-vixv.-hjxlparpakka-4.doc

Góðan dagin

Viðfest er hoyringssvar frá Ferðavinnufelagnum til hjálparpakka 4.

Vinaliga/Best Regards

Birita Biskopstø, ráðgevi/adviser

Vinnuhúsið / House of Industry
VINNUHÚSIÐ HOUSE OF INDUSTRY
Phone: +298 309900 · Cell phone: +298 739911
birita@industry.fo - www.industry.fo

LM-140/2020

Ferðavinnufelagið

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Postsmoga 377
FO-110 Tórshavn

Att.:

Tórshavn 29. marts 2021

Okkara tilv./Our ref.:
/Umhvxr-Ferxa-V
Tykkara tilv./Your ref.:

Viðmerkingar til uppskot til ll. um hjálparpakka 4

Ferðavinnufelagið takkar fyri møguleikan at ummæla uppskot til ll. um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19.

Ferðavinnufelagið hevur síðani hjálparpakki 3 fór úr gildi vist á tørvin á hjálparpakka 4 fyri ferðavinnuna.

Felagið fegnast tí um, at uppskotið um hjálparpakka 4 er greitt úr hondum og klárt at bera løgtinginum.

Felagið hevur tó nakrar ítøkiligar viðmerkingar til uppskotið:

Av tí at talan er um eitt longri stuðulstíðarskeið enn í hjálparpakka 3, eigur ikki at vera hildið fast í 10 mió kr. sum hægsta stuðulsupphædd. Hægsta stuðulsupphædd eigur í hjálparpakka 4 at vera 14 mió kr., sum er samsvarandi einum átta mánaðar tíðarskeiði.

Harafturat heldur felagið tað ikki vera rímiligt, at stuðulin, sum ávísar fyritøkur hava fingið í vetur vegna afturlating av teirra virksemi, skal mótróknast í hjálparpakka 4. Hetta er ikki rímiligt, tí tann stuðulin var veittur, tí myndugleikarnir stongdu fyri virkseminum hjá hesum fyritøkum.

Hjálparpakki 3 tók ikki atlit til stóru kapasitetsøkingina í gistingarhúsvinnuni í 2020. Hesum verður í ein ávísan mun lagt upp fyri í grein 5 í hjálparpakka 4. Kapasitetsøkingin í 2020 fevndi um tvey nýggj gistingarhús og eina stóra útbygging av einum verandi gistingarhúsi. Annað gistingarhúsið er sum kunnugt ikki fevnt av hjálpakka 3 og 4.

Grein 5, stk. 3 leggur upp fyri eini kapasitetsøking, um talan er um eitt nýtt gistingarhús á einari aðrari adressu enn verandi gistingarhús. Broytingin fevnir hinvegin ikki um eina útbygging av einum núverandi gistingarhúsi á somu adressu. Ferðavinnufelagið mælir til, at ein tílík kapasitetsøking eisini verður fevnd av grein 5, soleiðis at allir partar vera settir líka.

Útrokningargrundarlagið í mun til kapasitetsøkingina verður ikki nærri útgreinað í lógaruppskotinum, men felagið væntar at verða hoyrt, tá ið nærri ásetingar verða settar um hetta í kunngerð.

Ein onnur broyting í uppskotinum er, at uppgerðin skal áteknast av góðkendum grannskoðara, um stuðulsupphæddin er omanfyri 120.000 kr. Ferðavinnufelagið mælir í hesum sambandi til, at útreiðslur til grannskoðara í sambandi við umsókn til hjálparpakka 4 og harumframt til grandskoðaraváttanina verða endurrindaðar, um umsóknin verður gingin á møti.

Annars tekur Ferðavinnufelagið undir við uppskotinum og gleðist um, at hjálp nú er á veg til føstu útreiðslurnar hjá sperdu ferðavinnufyritøkunum.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Ummælisfreistin var nakað stutt og væntast má, at tað er møguligt, at fleiri viðmerkingar koma eftir at freistin er farin.

Vinarliga
FERÐAVINNUFELAGIÐ

Birita Biskopstø

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo